gult18 cyan18 magenta18 svart18



## ÚT AT KOYRA

### Rekordár hjá Toyota



Fleiri japansk dagbløð skriva, at triðstørsti bilframleiðarin í heiminum, Toyota Motor Corp., í fjør hevði eitt yvirskot uppá 66,65 milliardir krónur áðrenn skatt. Orsøkin var økt søla, lægri yenkursur og rationaliseringar.

*Kelda: Motor Magasinet*

# Nýggjur Fiesta – framskundaður til at koma seinni í ár

**Eftir ætlan skuldi ein heilt nýggjur Ford Fiesta koma á marknaðin miðskeiðis í 2002, men orsakað av fallandi sølutølum er verkætlanin framskundað til november í ár**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

At ein heilt nýggj generatión av Ford Fiesta var á veg, hevur verið eitt loyndarmál á menningarsentrinum hjá Ford í Køln inntil nú. Bilurin kemur væntandi á marknaðin í november í ár. Sum tað sæst á myndunum, verður nýggi Fiesta størri enn tann núverandi. Tað at aksulfrástøðan verður størri, hevur við sær at tað verður betri beinpláss við baksetrini.

### Nýggjan dieselmotor

Nýggi Fiesta kemur at njóta gott av nýggja coomon-rail dieselmotorinum, sum er gjørdur í samstarvi ímillum Peugeot og Ford. Einaferð næsta ár kemur Fiesta við automatisku koblingskipanini ASM ( Auto Shift Manual). Nýggi Fiesta skal eftir ætlan eisini skal byggjast í Brasilien. Ford kemur at hava eina góða vøruskrá, Focus er lutfalsliga nýggjur, í vár komu nýggir Mondeo og Transit, og nú kemur so eisini ein nýggjur Fiesta.

*Kelda: FDM / Motor*



*Aftan minnir nýggi Fiesta nakað um Focus, við lyktunum í aftaru stólpunum*





*Nýggi Ford Fiesta, sum verður væl størri enn forgangarin, verður gjørdur við 3 og 5 hurðum*

### Multipla ársins bilur



Annað árið á rað bleiv Fiat Multipla kosin »Familycar of the Year« av motorjournalistum á sendingini Topgear hjá BBC.

*Kelda: Fiat Automobiler Danmark A/S*

### Nissan í USA



Nissan hevur gjørt eina íløgu uppá 9 milliardir í eina nýggja bilverksmiðju í Mississippi til at framleiða smærri lastbilar, jeepar og familjubussar. Hetta er fyrsta nýggja verksmiðja hjá Nissan, eftir at Renault hevur keypt 37 prosent av partapeninginum.

*Kelda: Bilen Motor & Sport*

# Nissan Almera - nú eisini sum sedan





*Nissan Almera fæst nú eisini sum sedan, hesin hevur spoylara og sportsfelgur*

**Nú eitt ár eftir at Nissan Almera við 3 og 5 hurðum kom á marknaðin, er Almera nú eisini komin sum sedan**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Nissan Almera er teknaður og framleiddur í Europa, á Nissan bilverksmiðjuni í Sunderland í Onglandi. Málið hjá Nissan var at Almera skuldi hava líka góðar koyrieginleikar sum Peugeot 306.

Eitt lið av verkfrøðingum og testkoyrarum hava arbeitt av øllum alvi við at fínstilla koyrieginleikarnar á Almera, við serligum atliti til róðurgreiðir og fjaðraskipan. Hetta hevur givið úrslit, tí bilurin koyrir sera væl í allar mátar, og er sum ein franskur bilur at koyra.

### Nú sum sedan

Almera er bygdur yvir Nissan Primera plattformin. Bilurin fæst í útgávunum Comfort, Elegance og Sport, og tríggir motorar eru at velja ímillum, 1.5 litur og 1.8 litur bensinmotorar og 2.2 turbodiesel við beinleiðis innspræning, sum er størsti dieselmotorur í hesum klassanum. Nú eitt ár eftir at nýggi Almera kom á marknaðin, er hann komin higar í sedan útgávuni, við stórum og rúmligum viðførisrúmi. Sedan útgávan kostar umleið kr. 5000,- meira enn tann við fimm hurðum.

gult19 cyan19 magenta19 svart19



## Minningarorð um

# Petur Kruse



Døggin hevði ikki lagt seg henda vakra leygarmorgun, tá fløggini veittraðu í hálvari stong. Várkenslan og tann afturvendandi vónin um eitt eydnuberandi og vónríkt summar hvurvu í ivanum um, hvørjum tað útstrekta merkið í høgættarlotinum mundi veittra feigdarboð fyri, og skjótt bórust boðini um bygdina, at Petur var deyður.

Hóast Petur hevði verið álvarsliga sjúkur seinastu mánaðirnar, vardi tað ongan, at so stutt tíð skuldi ganga, at hann ikki skuldi vera ímillum okkum meira, herviliga sjúkan hevði fingið fastatøkur, og bert 51 ára gamal mátti Petur lúta fyri hesi herviligu sjúku leygarmorgunin 05.05.2001.

Petur var sonur Willa og Oliviu Kruse, yngstur av fýra systkjum búleikaðust tey úti í Geilini í Sørvági. Saman við pápanum varð ymiskt handaligt arbeiði gjørt í ungdómsárunum, og tá feria og onnur frítíð var til yvirs. Sum aðrir unglingar vildi hann eisini royna sjógvin, áðrenn lívsleiðin bleiv løgd. Grønlandsútróðurin, sum flestu unglingar vildu royna og sum kravdi nógvar mans, slapp Petur eisini at uppliva, og varð ofta tosað um hesa ríku tíð á ungdómsárum.

Fyrst í sjeytiárunum fór Petur á Læraraskúla og eftir lokna útbúgving var longsulin aftur til heimbygdina. Starvið bleiv ikki í heimbygdini, men saman við konu síni Biritu fingu tey starv á Giljanes skúla, har hann var nógv avhildin bæði av starvsfelagunum, foreldrum og børnum, og røkti hann hetta starv líka til sjúkan noyddi hann í sjúkafarloyvi.

Petur hevði eisini stóran áhuga fyri samfelagsviðurskiftum, og eingin ivaðist, hvar hann stóð politiskt. Hóast ósamdir, var virðing og álit nakað, sum eyðkendi Petur, tingini blivu ikki ballað inn, men tvørturímóti søgdu sum tey skuldu sigast, so eingin misskilti tey. Hvar tú hevði henda mann, ivaðist tú onga løtu í.

Frá 1992-1998 var Petur formaður í Sørvágs kommunu, ein tíð, sum kravdi nógv, og er tað bert familjan, sum best kennir til, hvussu hetta mundi slíta. Í hesum karga tíðarskeiði var ikki pláss fyri gulli og grønum skógum, men halda æruna og yvirliva uttan hjálp frá nøkrum øðrum, og hóast hesa døpru tíð, vórðu mál rokkin, vísast kundi á, at nøkur ting kundu bera til uttan milliónaupphæddir so sum barnagarðurin, dagtilboðið, sum Petur legði alla orku í, tað arbeiðið, sum tá bleiv gjørt fyri at fáa lunnarnar at liggja, ger tað møguligt í dag at draga bát. Onnur ting, oynni at frama, kundu eisini verðið nevnd, uppgávur hjá Føroya Kommunufelag vórðu eisini lætnar upp í hendurnar hjá Peturi at loysa, og tí kundi hann, merktur av sjúku, upprættur tann seinasta dagin í árinum eftir átta ára borgarliga tænastu, sum hann ikki vildi verið fyri uttan, lata aftur hurðina á tí bygningi, sum hevði givið nógvar spennandi uppgávur, men eisini svøvnleysar nætur.

Petur hevði eisini stóran áhuga fyri mentanarligum viðurskiftum, og var avrikið av bókini Sørvágs kirkja, sum Petur skrivaði til hundrað ára føðingardagin hjá Sørvágs kirkju í 1986, ein stoltleiki hjá honum, í hesi kirkju, saman við familjuni, á aftasta beinki var hansara pláss.

At Petur vildi ungdómi og bygdini væl í ítróttarligum samanhangi eru fleiri dømi um. Mitt í sjeytiárunum varð farið undir at byggja róðrarneyst í Sørvági. Her saman við øðrum legði Petur stóra orku í at fáa hetta bygningsverk liðugt, so ungdómurin kundi hava bestu møguleikar at virka undir.

At Petur var nógv avhildin maður gav jarðarferðin boð um, ongantíð hevur slík mannfjøld verið at sæð sum henda góðveðursdag, tá Petur varð borin til sítt síðsta hvíldarstað úr Sørvágs kirkju.

Góðu Birita, Rúni, Bogi, Unn og Rógvi, sorgin og saknurin níva, tárini væta í stríðum streymi koddan, útmaktað finna sorg og grátur svøvn tykkara. Hví alt hetta skuldi raka so meint, er bæði órættvíst og óskiljandi og vit standa spyrjandi hví, hví. Gleðin og vónin um eitt summar saman við konu og børnum á 25 ára brúdleypsdegi er brostin. Hóast blóman á markini stendur í sínum fulla blóma og ber boð um lív og ljósa tíð, reka tung skýggj inn yvir tilveru tykkara, ein rødd er tagnað, eitt eyga brostið, eingin mild hond kínur enni, eingin teskar um kærleika. Hóast ringt er at skilja mugu vit halda okkum til tann, sum øllum valdar, ein dag fara skýggini at draga frá, og sólin fer at kaga fram, brosandi minnast og tosa um upplivingar og hendingar, ein mann og pápa, sum var alt fyri tykkum og vildi hjálpa øðrum, men sum bleiv rivin frá tykkum í bestu árum, nú tíðin skuldi brúkast upp á tykkum. Gud signi tykkum og alla familjuna.

Gerst lívið stundum leitt á jørð,
Og harðar ódnir herja,
Gud flyta vil meg trygt um jørð,
Mót brotasjógvi verja;
So sterkur eingin stormur er,
Og streymur ei so stríður,
Hann fellur, steðgar síni ferð,
So skjótt mín faðir býður.

Hvíl í friði.

**Ein vinur**

## Minningarorð um

# Bárð Berg og Edvard Lenni Højgaard





Tað vóru tung boð, vit fingu fríggjamorgunin 30. mars. Ein vanlukka var hend inni á Lambareiði, og tríggir ungir dreingir vóru deyðir. Árant Joensen, Bárður Berg og Edvard Lenni Højgaard. Árant var ein góður vinur hjá nógvum av okkum, og Edvard og Bárður vóru tveir av okkara kærastu vinum og floksfelagum.

Tað var sum at missa tveir beiggjar. Tað tykist so óveruligt, at tveir ungir, raskir dreingir í teirra besta aldri knappliga ikki eru hjá okkum longur. Tað er so nógv, sum vit høvdu ætlað okkum saman, sum til dømis at fara aftur til Spania, har vit vóru eftir 10. flokk. Eisini hava vit prátað um, at um fimm ár skuldu vit øll møtast aftur, o.s.fr. At vit skuldu møtast aftur eftir bert tveimum árum, og undir hesum syrgiligu umstøðu, hevði eingin av okkum væntað.

Bárður og Edvard gingu í flokki saman við okkum í 10 ár. Samanhaldið í flokkinum hevur altíð verið gott, og eitt, sum styrkti samanhaldið enn meira, vóru allar útferðirnar, vit gjørdu runt Føroyar og uttanlands, har vit komu at kenna hvønn annan nógv betur. Vit kenna okkum næstan sum systkin, tí vit eru vaksin upp saman og kenna allar síðurnar hjá hvørjum øðrum.

Bárður var altíð blíður og gekk runt við sínum eyðkenda skálkasmíli. Hesum serliga smílinum fullu næstan allar genturnar í flokkinum fyri. Bárður var ótrúliga sjarmerandi og hevur altíð verið væl dámdur av øllum. Hann var erligur og ein trúfastur vinur. Hann hevði góðan humor, og hansara løgnu viðmerkingar gjørdu skúladagin nógv stuttligari. Hann var ofta miðpunktið í flokkinum, tí øll vóru so góð við hann. Tað var lætt at vera góður við Bárð, tí vit vita, at hann eisini var góður við okkum.

Edvard var tann stuttligi í flokkinum. Tá man var í ringum lag og ikki orkaði skúlan meira, gjørdi Edvard alt fyri at gera lagið gott aftur, og tað var skjótt, so sótu øll í skellilátri. Edvard var ein ótrúliga fittur og penur drongur. Hann var vinarligur og altíð klárur við einari hjálpandi hond. Hann var góður við øll og tók sær væl av sínum kæru. Hann hevði nógvar vinir, og tað, honum dámdi best, var at hava teir rundan um seg. Vit hava altíð verið góð við Edvard og sakna hann ótrúliga nógv.

Vit hava so nógv felags minnir um Edvard og Bárð; vit hava livað helvtina av okkara lívi saman við teimum. Vit hava upplivað so nógv saman, bæði gleðir og sorgir, og nú kennist alt so tómligt. Tað er so torført at seta orð á sorgina og so ringt at siga farvæl. Vit fara altíð at minnast Bárð og Edvard við einum smíli og takka fyri ta tíðina, vit fingu saman við teimum.

Okkara djúpastu samkenslur fara til tykkum, sum nú sita eftir. Má Harrin signa og styrkja tykkum í hesi sváru tíð.

Við takksemi lýsa vit frið yvir minnið um Árant Joensen, Bárð Berg og Edvard Lenni Højgaard.

*Grøð sorgarsár,*
*o, Faðir vár,*
*so tína leið vit skilja.*
*Tak tað, tú vilt,*
*ger hjartað stilt*
*ger lyndið milt,*
*alt eftir tínum vilja.*

*Á sorgarstund,*
*av hjartansgrund*
*á skilnartíma sárum*
*eg biði teg,*
*tú leiði meg*
*tín tronga veg*
*at endaleysum árum.*

**Johan Dávur, Jørmund, Kristian, Dion, Hallfríð, Linda, Tóra, Anna Malena, Anna Maria, Emma Maria, Hilda, Maria, Jenny, Ruth, Majken, Joan, Sarita, Súsanna, Helena, Jannet og Lív**